gult cyan magenta svart





**SAMRØÐA. Tað norðurlendska hevur ein nógv størri leiklut hjá okkum smátjóðum enn tað hevur í teimum størru londunum. Serliga hjá okkum sokallaðu sjálvstýrandi økjum er tað norðurlendska samstarvið tann fremsti fleirtjóða politiski pallurin, ið vit hava atgongd til, sigur Mikkjal Helmsdal í samrøðu millum jólanna, nú hann skrivar ritgerð og heldur fram sum leiðari av Nordens Institut í Álandi**



*Mikkjal Helmsdal heldur fram sum stjóri á Nordens Institut í Álandi*

# Føroyingur í Eystrasalti

*Birgir Kruse*

Bert fáir føroyingar starvast í norðurlendskari miðfyrisiting. Havnarmaðurin Mikkjal Helmsdal er ein teirra. Síðani 1997 hevur hann verið stjóri á Nordens Institut í Álandi.

Nú er sáttmáli hansara longdur við trimum árum fram til summarið 2004. - Annars skuldi eg givist í juli mánaða í ár. Men eg havi ein vanligan setanarsáttmála við tríggja mánaða uppsøgn, tað er bara tað at hann er tíðaravmarkaður. Nú er hetta evsta markið so flutt til 31. juli í 2004, sigur Mikkjal, sum er fegin um at halda fram, tí hetta er heilt greitt eitt heraklapp fyri væl útinnt arbeiði. - Men hinvegin kenni eg meg ikki bundnan at vera tíðina út. Bjóðast mær ein nóg spennandi uppgáva, áðrenn starvstíðin er úti, so skal eingin vera bilsin av at síggja teltpelarnar hjá familjuni Helmsdal verða drignar úr álendsku moldini, leggur hann smírandi afturat.

*– So tú ætlar ikki at festa røtur í Álandi?*

Nei. Eg flutti yvir higar saman við føroysku konu míni, Árnu, sum eg eigi tvey børn saman við. Tað hevur alla tíðina verið ætlanin at venda heimaftur, og at børnini skulu vaksa upp í Føroyum. Eldra dóttir okkara var 4 ár, tá vit fluttu, yngra dóttir okkara føddist stutt eftir, at vit komu higar. Nú er eldra dóttirin byrjað í skúlanum, og tað í sjálvum sær avmarkar tey árini vit vera afturat her. Men Áland festir helst røtur í okkum, og tað er einki at ivast í, at hetta plássið kemur altíð at vera serligt fyri okkum.

*- Hvør er tín bakgrund?*

Tað man vera kunnugt fyri tey flestu, at eg havi fingist nógv við sjónleik og mentan yvirhøvur. Eg havi lisið dramaturgi ella leiklistafrøði við universitetið í Århus í 80unum , og upp gjøgnum 90ini havi eg arbeitt við eitt sindur av hvørjum. Eitt nú sum fyriskipari av mentunarkvøldum í Norðurlandahúsinum um sumrini og so gjørt onkrar sjónvarps- og útvarpssendingar. Mest havi eg kortini arbeitt innan sjónleikin sum lærari, leikstjóri, sjónleikari og seinastu árini – áðrenn eg flutti til Álands – var eg í føstum starvi hjá sjónleikarbólkinum Grímu sum dagligur leiðari. At eg leitaði til eitt starv sum hetta á Álandi, kemst helst av, at eg altíð havi havt áhuga fyri at skipa fyri og fáa ting í gongd. Nógv av tí arbeiðinum, eg hevði í Føroyum, eitt nú fyri Norðurlandahúsið og Grímu, snúði seg júst um tann partin: Um projektleiðslu og at leggja til rættis og gera karmarnar um tað skapandi arbeiðið hjá øðrum. Her á Álandi havi eg hildið meg burtur frá tí beinleiðis listarliga arbeiðinum og bara fingist við at skapa fyritreytir fyri virkseminum hjá øðrum listarfólki. Tað hevur verið sera spennandi og ein avbjóðing at fáa møguleikan at útvikla projektini frá grundini av, fáa hugskotini, skapa organisatiónina og finna røttu fólkini at seta alt í verk. Reint arbeiðsliga hugsi eg eisini, at hetta er tann leikluturin eg komi at leggja størstan dent á í mínum framtíðar yrkislívi.

*– Hvat tekst tú við nú millum jólanna?*

Eg havi langt um leingi tikið meg saman, so eg kann verða liðugur við universitetsútbúgvinga. Siti í hesum døgum og skrivi cand.mag. ritgerð um íslendska leiklist, sæð úr einum mentunar- og sjónleikarpolitiskum sjónarhorni. Eg byrjaði beint undan jólum og havi tikið mær frí tær komandi fýra vikurnar fyri at fáa hetta liðugt. Tað sær út til at fara at eydnast, higartil eru 57 síður lidnar.

*– Hví hevur tú valt júst hetta evnið?*

Ísland er sum sjónleikaraland á mangan hátt ein fyrimynd hjá okkum í Føroyum, og persónliga havi eg altíð havt stóran áhuga fyri íslendskari leiklist. Virksemið í Íslandi innan leiklist er nógv tað størsta í Norðurlondum, um vit samanbera við fólkatalið. Hartil kemur, at so at siga einki er skriva um nútíðar sjónleik í Íslandi, hvørki í Íslandi ella aðrastaðni í Norðurlondum. So her er talan um leiklistarfrøðiliga nýdyrking í norðurlendskum høpi.

*– Hvussu man tað bera til, at føroyingar yvirhøvur hava so stóran áhuga í norðurlendskum viðurskiftum?*

Tað norðurlendska hevur ein nógv størri leiklut hjá okkum smátjóðum enn tað hevur í teimum størru londunum. Serliga hjá okkum sokallaðu sjálvstýrandi økjum er tað norðurlendska samstarvið tann fremsti fleirtjóða politiski pallurin, ið vit hava atgongd til. Eg haldi, at tað norðurlendska samstarvið er serliga sterkt og sjónligt í Føroyum, og tað haldi er Norðurlandahúsinum fyri at takka. Bara tað at tað finst, minnir okkum dagliga um, at vit eru ein partur av Norðurlondum, og at vit hava eitt bæði praktiskt, politiskt og mentunarligt samband við hini norðurlondini. Í teimum størru londunum er torførari at fáa eyga á tað norðurlendska, tað er ikki líka innlýsandi neyðugt fyri vanliga borgaran at tað skal finnast, og tað er alla tíðina neyðugt uppfinna tað norðurlendska samstarvið av nýggjum og finna tí uppgávur, sum kunnu rættvísgera tess framhaldandi tilveru. Eftir at Svøríki og Finland fóru inn í ES hevur tað politiska samstarvið fingið ein nýggjan leiklut, eina endurupplíving, eftirsum tey norðurlendsku londini nú hava fingið brúk fyri at standa saman fyri at fáa sjónarmið síni ígjøgnum í Europa. Hvat viðvíkur Føroyum er eingin ivi um, at fyri okkum smátjóðirnar er alt at vinna við at halda fast um tað norðurlendska samstarvið og vera við til at tryggja tess framtíð.

*– Er tað ein trupulleiki, at vit hava so fáar føroyingar í týðandi norðurlendskum størvum?*

Eg veit ikki um tað ber til at siga, at tað er ein trupulleiki. Men tað er ein sannroynd, at vit eru fáir. Í roynd og veru haldi eg bara vit eru tveir føroyingar í løtuni, sum starvast innan Nordisk Ministerråd. Og tað er ynskiligt at tað vera fleiri. Og hugsi eisini at tað vildi verið gagnligt fyri Føroyar: størvini eru spennandi og mennandi, og tað norðurlendska samstarvið gevur nógv sambond og tilgongd til nógv netverk, sum ein hevur stóra nyttu av, tá ein vendir heimaftur. Men tað krevur, at fortreytir finnast hjá væl kvalifiseraðum fólki at søkja størvini, eitt nú at tað veruliga finnast møguleikar at fáa farloyvi o.a. Vit áttu at miða eftir, at tað altíð finnast 2–3 føroyingar í leiðandi umsitingarligum størvum innan norðurlendska samstarvið. Eg haldi ikki vit fáa nýtt møguleikarnar í samstarvinum til fulnar, um vit ikki hava fólk inni í organisatiónini, sum hava føling við teimum aktuellu arbeiðsgongdunum og prioriteringunum.

*– Mentunarliga "veðurlagið" hvussu er tað í Álandi, samanborið við Føroyar?*

Størsti munurin er, at mentunarlívið í Álandi er næstan bara áhugavirksemi. Tann professionaliseringin, ið vit hava sæð innan næstan allar listargreinir í Føroyum, er bert spakuliga byrjað her á Álandi. Innan sjónleikin t.d. er eingin virkandi professionellur bólkur. Her hevur Nordens Institut gingið á odda seinastu 3 árini og hevur sett upp 4 professionel sjónleikartiltøk. Eisini myndlistin er næstan bara eitt amatørfyribrigdi. Tann klassiski tónleikurin er í støðugari menning, takkað verið einum sera góðum musikkskúla, sum nú hevur umleið 12 ár á baki. Men innan rock og popptónleikin millum ung er ikki nógvur aktivitetur. Her hevur Nordens Institut roynt at fáa gongd á við eini tónleikakapping. Tann útbreidda amatørisman innan allar listargreinir hevur við sær eina ávísa mistrúgv móti yrkislist og móti nýggjari list. Amatørlistin her á Álandi er fyri tað mesta rættiliga konservativ og afturlítandi og móttøkan av henni sera ókritisk. Líka mikið hvat álendskir listamenn borðreiða við, verður tað altíð róst. Og tað er bæði gott og ringt. Fært tú góða móttøku, eggjar tað tær til at halda fram. Er móttøkan altíð góð, líka mikið hvussu dygdin er, so motiverar tað teg ikki til at royna at blíva betur. Og tað er júst tað, sum í alt ov stóran mun merkir álendskt mentunarlív: Ein hvílan á laurberjunum og ein sjálvsnøgd við egin avrik, sum í alt ov lítlan mun er mótsvarað av listarligari dygd. Men álendsk áhugamentan hevur eisini positivar síður, og tá hugsi eg um tær nógvu eldsálirnar, sum fáa ómetaliga nógv sett í verk her. Nøgdin av mentunarligum tiltøkum er ótrúlig, og nógv gott er eisini ímillum. Fleiri og fleiri professionel listarfólk eru eisini farin at búseta seg á oyggjunum, og tað merkist, t.d. innan fyri sjónleikin og tónleikin, at áskoðarafjøldin er blivin eitt sindur meira kravmikil, hvat dygdini viðvíkur. Eg hugsi tað ber til at siga, at menningin innan listirnar á Álandi liggur eini 30 ár aftan fyri teirri føroysku. Eitt øki, har álendingar kortini liggja langt frامman fyri okkum, er tá tað snýr seg um varðveiting av og upplýsing um mentunararvin. Søvn, fornminni, bygningar og landsløg verða varðveitt og gjørd atkomulig fyri almenningin og skúlabørn upp á ein máta, sum fær føroyska fornminnisumsiting at líkjast einum...ja, steinaldarfyribrigdi. Her hava vit nógv at læra av álendingum.

*– Mentunarpolitikkur skal definerast, siga tey her heima í Føroyum. Meðan vit bíða, kunnu vit so læra nakað av álendingum?*

Álendingar hava seinastu 6 árini arbeitt miðvíst við at menna og konkretisera sín mentunarpolitikk, og politikkurin verður førdur eftir einum greiðum málsetningi. Seinast hann var til viðgerðar var í 1998 og tað var ein arbeiðstilgond, sum eg haldi vit kundu tikið eftir í Føroyum. Fyrst orðaði álendska landsstýrið eina mentunarpolitiska frágreiðing, hendan var síðani tikin til aðalorðaskifti í álendska løgtinginum í tveimum umførum, við eini sera nágreiniligari viðgerð í løgtingsins mentanarnevnd ímillum. Nevndin gjørdi sær millum annað tann ómak at hoyra meiningarnar hjá øllum teimum týdningarmestu felagsskapunum og stovnunum innan mentunarlívið. Úrslitið var so eitt fýra ára mentunarprogramm, sum varð samtykt við breiðum meiriluta í løgtinginum, og har løgd vóru nøkur føst mál fyri, hvat skuldi avrikast á mentunarøkinum tíðarskeiðið 1998–2002. Eg haldi hetta programmið hevur verið eitt sera gott stýringsamboð, og tær linjurnar, sum vórðu lagdar í tí, hava ført til nógv ítøkilig framstig innan mentunarlívið. Eitt nú eru fyritreytirnar fyri størri professionalisering innan sjónleik og tónleik kannaðar, og stig tikin, sum miða ímóti at fáa gongd á virksemið á hesum økjum.

*– Er nakar munur á at búgva mitt í Eystrasalti og so út í Norðuratlantshavi, soleiðis reint mentalt? Er álendingurin meiri "kontinentalur" enn føroyingurin?*

Tá eg flutti higar, hevði eg væntað, at álendingarnir vóru meira kontinentalir, sum tú skrivar, meira í sambandi við meginrákini í Norðurlondum enn føroyingar, at her var eitt mentunarlív og eitt alment kjak, sum var meira hipp, og ikki so heimføðisligt sum í Føroyum. Áland liggur jú bara nakrar fáar tímar við báti og minni enn ein hálvan tíma við flogfari frá svenska høvuðsstaðnum Stokkhólmi vestarumegin og næst stórsta finska býnum Åbo eystarumegin. Ein trýr og væntar, at her er fólkið munandi meira opið og áhugað fyri útheiminum enn vit, sum búgva avbyrgd langt úti í Atlantshavinum. Men veruleikin er beint tvørturímóti. Hóast nærleikan til stórbýirnar í vestri og eystri, so er Áland mentalt sæð ein tann uttasti provinsurin í Norðurlondum. Fólkið er vent inneftir móti sínum egna lokala samleika, síni fortíð og øllum, sum ein uppfatar sum sína serligu mentan. Tað álendska samanhaldið er øgiliga sterkt, og ein sum flytir higar, skal ikki vænta, at hann uttan víðari kann gerast partur av tí dagliga netverkinum og at vera boðin inn í privatlívið hjá fólki. Eftir at hava búð her í trý ár, hava eg og familjan t.d. ongantíð verið boðin heim til eina heilálendska familju; øll ið vit koma saman við privat, eru húski, har í minsta lagið annar parturin er fluttur higar uttanífrá. Tað kann forklárast bæði í søgu og nútíð við, at Áland liggur og altíð hevur ligið soleiðis fyri, at nógv fremmandafólk ferðast hendan vegin. Gestir hava tí ongantíð, eins og í Føroyum, verið sjáldsamir, men tvørturímóti verið bæði dagligir og talríkir, og í gomlum døgum ikki altíð heldur so tespiligir. Álendingarnar hava tí, hetta vitna ferðafrágreiðingar um fleiri hundrað ár aftur í tíðina, altíð fyrihildið seg til vitjandi á ein avvísandi, ella í besta lagið reint handilsligan hátt. Hyggur ein eftir støðuni í dag, so er tørvurin stórur at halda fast við egnan samleika og sereyðkenni, júst tí at oyggjarnar liggja so nær tveimum tættbygdum meginøkjum, har málið er tað sama, og tann lokala sermentanin tí lætt kann køvast, um ikki manngarður verður sligin um hana.

*– Men hvat siga so álendingar um føroyska kjaki um fullveldi? Hevur hetta kjakið skapt nakað "ekkó" í Álandi?*

Jú, tað hevur tað. Fyrr hevur álendskt fullveldi ongantíð verið eitt evni í álendskum politikki. Tað var bert ein lítil bólkur á ytsta høgraveinginum, sum talaði fyri hesum. Upp undir seinasta valið í 1998 var álendskt fullveldi ongantíð nevnt við einum orði undir valstríðnum. Men eftir valið í 98 var stovnað ein rørsla, sum hevur fingið undirtøku frá fleiri etableraðum politikarum, bæði núverandi og fyrrverandi. Hendan rørslan, sum kallast Ålands framtid, hevur latið tveir altjóða viðurkendar samfelagsfrøðingar gera eina kanning av fortreytunum fyri einum sjálvstøðugum Álandi. Hendan kanning er nú givin út í bók, og hevur verið nógv umrødd her í heyst. Tað slepst neyvan undan, at kjakið um fullveldi verður eitt høvuðsevni, tá val verður aftur 2002. Men fullveldi sum so liggur nokk langt frammi í tíðini. Álendingar eru ógvuliga pragmatiskir og økonomiskir í sínum hugsunarhátti, og tey flestu vilja halda fast við sambandið við Finland, so leingi tað er ein fyrimunur í tí. Og hóast tað nú er hitt respektabla høgra, ið flytur tankarnar fram, so er álendskt fullveldi fyrst og fremst eitt høgraprojekt, sum styggir flestu mið- og vinstraveljarar frá sær. Men persónliga haldi, at tað hevur verið sunt fyri kjakið um álendska sjálvstýrið og tess framtíð, at spurningurin um fullveldið er tikin fram, og at allir partar í samfelagskjakinum mugu taka støðu til hann.

*– Næsta ár er fyri fyrstu ferð Listastevna í Føroyum. Hvat hevði tú sett ovast á ynskiseðilin?*

Eg kundi tonkt mær at sæð The Royal Shakespeare Company á pallinum í Norðurlandahúsinum, gjarna við tí uppsetingini av "Hamlet", sum eg veit at teir ferðast kring Europa við júst nú, um hon framvegis er á skránni komandi summar. Góða modernaða dansilist kundi eg eisini ynskt mær, tað eru vit ikki forvand við í Føroyum.

*– Takk fyri prátið og framhaldandi gott nýggjár!*

Somuleiðis!



*– Álendingar hava seinastu 6 árini arbeitt miðvíst við at menna og konkretisera ein mentunarpolitikk og politikkurin verður førdur eftir einum greiðum málsetningi*